# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



# TOYOTA keypt se



*Tesla Model S verður ein kollvelting, tá hann kemur á marknaðin í 2012. Bilurin hevur næstan 300 hk, koyrir frá og 0-100 km/t upp á 6 sekund, og toppferðin verður uppá næstan 200 km/t. Bilurin koyrir 480 km upp á eina løðing, og battaríini kunnu løðast upp á einans 45 minuttir*



*Á Svangaskarði er nokk av plássi og góðar umstøður til kampingvognar*

# Kampingtreff á Svangaskarði

Kampingtreff verður á Savngaskarði frá mikudegnum 23. juni til mánadagin 28. juni.

Meðan kampingtreffið er, verður B68-dagur eisini hildin á Svangaskarði leygardagin 26. juni.

Fríggjakvøldið tann 25. juni verður felagsborðhald, har kampistarnir koma við sínum mati til felagsborðhaldið. Fríggjakvøldið verður eisini ungdómsdiskotek, og dansur við Robin Walthers verður leygarkvøldið í teltinum á rennibreytini.

Á Svangaskarði eru allir hentleikar. Á økinum fæst el og vatn, og umstøður eru til at tøma rottangan, eins og atgongd er til bæði wc og brúsu, sigur Haldur Gaardbo á Toftum, sum er samskipari av kampingtreffinum og B68-degnum. Tað er felagið »camping.fo«, sum skipar fyri treffinum.

Meira upplýsingar eru á heimasíðuni www.camping.fo